


www.oljan.fo

**Jan Müller** 12 - 02 - 2013

# Vinnuferð til Grønlands í apríl

Í døgunum 15. til 19. apríl skipar Føroya Arbeiðsgevarafelag fyri vinnuferð til Grønlands, har eisini løgmaður, Kaj Leo H. Johannesen, fer at luttaka. Skráin fyri ferðina er ikki endaliga ásett enn. Ætlanin er at skipa fyri felags tiltøkum við kunning til føroysku fyritøkurnar um grønlendska vinnuumhvørvið, og grønlendarar verða kunnaðir um føroyskt vinnulív. Eisini verður skipað fyri business to business fundum, har grønlendskar og føroyskar fyritøkur fáa møguleikan at tosa beinleiðis saman. Ávegis til Grønlands er ætlanin at gera ein steðg í Íslandi, har fyritøkan Alcoa í Káraknúkum verður vitjað. Prísurin fyri luttøkuna er fyribils ásettur at verða 17.000 kr/persón fyri limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag og undirfeløgum tess og 19.000 kr/persón fyri fyritøkur, sum ikki eru limir í nevndu feløgum. Hesir prísir eru tó treytaðir av, at Vinnuframagrunnurin stuðlar ferðini. Talið av plássum á ferðini eru avmarkað. Tí hava limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag og undirfeløgum tess rætt til luttøku á ferðini framum fyritøkur, sum ikki eru limir skrivar Vinnuhusið morgun. Boðast skal frá luttøku við at senda eitt teldubræv til industry@industry.fo